# 2004 – hendingar, meiningar og myndir

Tíðindaflutningur nú á døgum er ikki tann sami, sum hann var fyri nøkrum fáum árum síðani. Nýggjar tøkniligar uppfinningar hava gjørt, at tað gongur alsamt skjótari við tíðindum. Internet, parabolsjónvarp og digital tøkni av ymsum slagi hava havt nógvar nýggjar møguleikar við sær, men við nýggjum møguleikum koma eisini ofta nýggj krøv og nýggir vansar.

Tað hevði borið illa til hjá føroysku tíðindabløðunum at komið út annan hvønn dag, sum tey gjørdu fyrr, og uttan heimasíðu á interneti er tað skjótt at detta niðurímillum. Nú skulu bløðini á gøtuna minst fimm ferðir um vikuna, og tey skulu verða á tremur við øllum tí nýggjasta, sum er hent seinastu dagarnar – ja, seinastu tímarnar – áðrenn útgávuna. Tað er eisini pláss fyri meira tíðarleysum greinum, interviewi og kjaki, men tíðindi, meiningar og myndir eru ein týðandi partur av blaðútgávum nú á døgum.

Bløðini eru nú væl útgjørd við nýggjastu tøknini, og hon lættir nógv um í gerandisdegnum. Internetið er alneyðug uppfinning, sum ger tað lætt at senda tilfar millum teldur, býir og lond. Tað snýr seg um sekund ella í ringasta føri minuttir at fáa greinar, myndir, upplýsingar, tíðindaskriv, meiningar, boð ella annað fram á rætta stað. Tað er ikki longur neyðugt at sleikja frímerki fyri at fáa eitthvørt blaðtilfar úr einum staði til annað. Samskifti á interneti er skjótt og praktiskt – eisini hóast nógv óneyðugt samskifti eisini fer fram – og bløðini njóta gott av tí.

Fartelefonin hevur eisini broytt nógv í samfelagnum. Nú er lættari at fáa fatur á fólki. Tað er eingin orsøk at fara umvegir fyri at fáa fatur í einum fólki, øll hava fartelefonin, og líka so irriterandi, hon kann vera í skeivu løtunum, líka vælsignað er hon ofta í gerandisdegnum, og so skuldi næstan ikki verið neyðugt at endurtikið hatta um óneyðugt samskifti sum ein partur av handlinum.

Fyri nøkrum árum síðani var tað ofta spurt, um nakar mundi havt tikið myndir av eini hvørjari hending, sum var farin fram, har blaðið ikki hevði havt fólk úti. Nú er ikki neyðug spyrja tann spurningin longur. Nú ljóðar spurningurin bara, hvør mundi taka myndir. Alt, sum fer fram nú á døgum, verður fotograferað úr høvd í r…

Sosialurin hevur í ár, sum so mong onnur ár, verið við, har nakað hendir. Blaðið hevur fólk kring landið og uttanlands, og tíðindaflutningurin í blaðnum er fjølbroyttur og umfatandi. 2004 varð eitt hendingarríkt ár, og nú árið syngur sítt síðsta vers, hava vit í hesum eykablaðið tikið fram nakrar av hendingunum, sum hava sett dám á hetta árið. Hetta er ikki ein roynd at gera eina fullkomna mynd av árinum, ið fór, men heldur at geva fólki eina kavalkadu av tí, sum Sosialurin hevði at bjóða í 2004. Hetta er bert ein lítil brøkpartur av tí, sum hevur verið at finna í teigunum í Sosialinum, men her eru nakrar hendingar, meiningar og myndir, sum vóru frammi í 2004.

Ger so væl og gott nýggjár!

Sosialurin


Sosialurin
Sjálvmál!


Sosialurin
Alt fleiri gerast frisk


Sosialurin
Boksarin Breckmann


Sosialurin
Landsstýrið umhugsar at senda neyðhjálp

# Avbjóðingarnar hava ongantíð verið størri

Tað sigst, at ein klaksvíkingur eina ferð skuldi siga, at hann tímdi ikki longur at arbeiða í grótbrotinum. Orsøkina segði hann vera, at arbeiðið ongantíð varð liðugt!

Nakað soleiðis er tað at vera til arbeiðis á einum blaði. Áðrenn dagsins blað er farið út av húsinum og í pressuna, so er sjøtul settur á næsta blaðið, og støðugt verður hugsað og lagt til rættis, hvussu næstu og uppaftur næstu bløðini skulu síggja út, og hvat innihaldið skal verða.

Talan er um serliga bransju, og tað er einki loyndarmál, at kappingin er rættiliga tøtt. Søgan sigur, at føroysku bløðini vóru væl fleiri fyri 20 árum síðani, enn tey eru í dag. Fleiri hoyknaðu og komu ikki fyri seg aftur. Men hugurin at fara undir nýggjar blaðútgávur tykist framvegis at vera góður. Fleiri royndir hava verið gjørdar. Onkur er dottin niður fyri í árinum, sum nú er um at vera runnið, og onnur hava brotið upp um armar, tí tey hava hildið seg sæð ein nýggjan glotta og møguleika. Soleiðis hevur tað altíð verið, og soleiðis fer tað at vera. Møguleikarnir og avbjóðingarnar eru víðopnar.

Sosialurin verður hvønn einasta dag mintur á, hvussu karmarnir og fyritreytirnar at liva í og undir eru.

## Gott ár

Ársskiftið er ikki høvi bert at leggja seg afturá og í sjálvsgleði at staðfesta, at tað eisini í hesum árinum eydnaðist at fáa blaðið út hvønn dag. Avbjóðingar liggja fyri framman. Tær eru nógvar, fjøltáttaðar og spennandi, og framtíðin fer at vísa, hvørjar tær eru. Men áðrenn onkur teirra verður nevnd, so loyva vit okkum at siga, at 2004 hevur verið eitt hampuliga gott ár fyri Sosialin.

Lesararnir og lýsararnir hava tikið so mikið dyggiliga undir, at tað hevur verið møguleiki at styrkt um blaðið. Samlaða síðutalið er stórt, og upplagið økist støðugt. Í hesum árinum hevur tað eydnast prentkvøldið at fáa blaðið út til ein ógvuliga stóran part av haldarunum og mest sum allar leysasølurnar.

Nøkur av innihaldsligu málunum eru eisini rokkin. Eitt nú at styrkja um vikuskiftistilfarið, uttanlandstilfarið og navnatilfarið, og tað hevur eydnast hesar seinastu vikurnar at hava serligt vinnutilfar. At hetta síðsta hevur fingið góða móttøku gevur treysti at halda fram við hesum. Gamli dreymurin at birta undir og kveikja debatttilfarið tykist eisini verða um at gerast til veruleika. Tá ið tað eftir summarfrítíðina varð farið undir at styrkja um vikuskiftisblaðið, varð sagt, at ætlanin var viðhvørt at geva kronikkirnar, tinghelluanalysurnar og relevant debattilfar annars út í bóklingi. Hetta er framvegis ætlanin.

## Nýggjar ætlanir

Hvat nýggja árið fer at bera við sær, fer tíðin at vísa. Mennesker spår, men Gud han rår, plagar at vera tikið til. Katastrofan í Bengalsku víkini í hesi vikuni er enn ein undirstriking av, at tað kann vera so skjótt, at fyritreytirnar gerast heilt øðrvísi, enn tær tóktust at vera.

Eingin skal ivast í, at á Sosialinum verða ætlanir lagdar. Í einum blaðhúsi er tað sjúkueyðkenni, um nýggjar hugsanir og ætlanir ikki verða klæktar. Summar gerast til veruleika heilt skjótt, meðan aðrar bíða ella kanska detta heilt niður fyri. Avbjóðingin er ikki at seta seg upp afturá og at vera nøgdur við tað, sum er. Tað hevði verið tann vissi deyði.

Onkrar ætlanir hjá okkum eru so tætt undir borðinum, at vit avgjørt rokna við, at tær fara at gerast veruleiki. Ein er, at Sosialurin um ikki so langa tíð fer at flyta av Argjum og heim í miðbýin í Havn, har handilin hjá Valdemar Lützen verður karmur um framtíðar virksemið hjá blaðnum.

Blaðnum er kanska ikki heilt tað rætta orðið. Avbjóðingarnar í miðlaheiminum eru nógvar og stórar. Ein er, at traditionellu bløðini gerast til margfaldir miðlar ella miðlahús. At Sosialurin skal gerast miðlahús, sum er í uppaftur tættari samskifti við brúkararnar, enn hann higartil hevur verið, er ein av dreymunum. Flytingin í miðbýin í høvuðsstaðnum fer at fjøltátta møguleikarnar. Hvussu hetta ætlast at verða gjørt, og harvið hvussu hetta ætlast at kennast aftur í samskiftinum millum blaði og lesararnar og lýsararnar fer at verða meiri at frætta um seinni í vetur og í vár. Avbjóðingarnar bíða, og blaðið og tað vil siga starvsfólkini eru eisini í hesum føranum sinnað at taka við teimum.

Sosialurin vil takka lesarum sínum fyri 2004, og vit ynskja øllum eitt gott nýggjár.

**Jan Müller,**
**ábyrgdarblaðstjóri**